# NÁMSÆTLAN

Einsangur

Tórshavnar musikkskúli

## ALMENN LÝSING AV LJÓÐFØRINUM

Røddin er helst tað mest persónliga ljóðførið við tað, at ongar røddir eru eins. Røddin fylgir altíð við okkum, og verður hon formað gjøgnum alt lívið. Sostatt ber til at siga, at røddin er ein partur av okkara samleika. Við hjálp av teknikki og venjing kunnu vit venja vøddarnar og andadráttin at samstarva og á tann hátt læra at brúka røddina á ein sunnan og gagnligan hátt.

# INNSKÚLING – MENNINGARSTIG 0

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur grundleggjandi framførsluførleika.
- luttekur í samanspæli/sangi, og er felagsliga fúsur og virkin.
- lærir við at spæla, kanna, troyta nýggjar leiðir, og hugleiða um tað, ið farið er fram.
- kennir grundhugtøk innan tónleik.
- venur seg við at framføra á hóskandi palli.
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felagssamleika.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Tað týdningarmesta í innskúlingini er sanggleði; at eggja næminginum til at hava tað stuttligt, meðan sungið verður; at fáa næmingin at tora at syngja og at trúgva uppá seg sjálvan og sítt ljóðføri; at læra at opna munnin væl; úttala týðiligt; brúka oyruni og herma; herma klappaðar rútmur; og syngja av heilum hjarta. Í innskúlingini verður ikki arbeitt so nágreiniligt við sangteknikki, men eitt sindur við andadrátti. Viðmælt verður, at sangarin eisini luttekur í kóri.

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- menna eitt frálæruumhvørvi, har samstarv, uppliving og virksemi verða sett í hásæti.
- leggja dent á arbeiðshátt og dugnaskap.
- leggja lunnar undir grundførleika og tónlistaligar grundtættir.
- vekjur ans og mennir hjáveru.
- er opin fyri breiðum og fjøltáttaðum samstarvi
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika.

# INNSKÚLING - MENNINGARSTIG 0

## VERKLISTI

*Karin - Hanus G. Johansen/Steintór Rasmussen*

*Hundur mín Kingoson - Steintór Rasmussen/Ingi Isaksen*

*Dukkan Fía - Mogens J. Nissen/Hjørdis Johansen*

*Can You Feel The Love Tonight - Elton John/Tim Rice*

*Edelweiss - Rodgers and Hammerstein*

*Yesterday - McCartney/Lennon*

*Let It Be - McCartney/Lennon*

*Barnið - Sigmund Poulsen/Jóhannus á Rógvi Joensen*

*Elisabet og Elinborg - Eivør Pálsdóttir*

*Kom og heintið nakrar summardáar - Jensina Olsen*

*Syngja sama lag - Ólavur Jacobsen*

*Kúllaknút - Gunnar Geertsen/Allan Dalsgarð*

*Meg minnist eina mynd - Jógvan T. Joensen/Hans A. Djurhuus*

*Hakuna Matata - Elton John/Tim Rice*

*Árstíðirnar - Jensina Olsen*

*Puff mín loynidreki - Leonard Lipton/Steintór Rasmussen*

*Summardáasangurin - Sebastian/Súsanna Tórgarð*

*Silvurkannan - Hans A. Djurhuus*

*My Favorite Things - Rodgers and Hammerstein*

*Do-Re-Mi - Rodgers and Hammerstein*

*Firvaldur - Alexandur Kristiansen/Pauli Hansen*

*Várið er eitt lambamæ - Sólrun Michelsen/Pauli Hansen*

Harafturat ein rúgva av øðrum sangum alt eftir, hvat ið hóskar seg best til hvønn einstaka næming.

## VENJINGAR

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

# BYRJANARDEILD - MENNINGARSTIG 1

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin dugr at handfara ljóðføri og brúka partar av tí.
- næmingurin hermir, spælir/syngur løg og rytmur eftir oyranum.
- lurtar eftir, og metur um egnu framførslu.
- merkir taktina/pulsin í verkinum.
- lesur nótar við at syngja á nótanøvnum.
- lesur nótar við at samanbera og finna nótar, ið líkjast.
- spælir einføld løg av nótablaði.
- ger, fyriskipar og skrivar niður síni egnu løg.
- finnur upp á løg út frá tónum, søgum, og huglagi.
- greiðir frá tí, ið eyðkennir góðan spælihátt og góða grundleggjandi tøkni.
- venur regluliga og samstarvar við læraran og foreldur/avvarðandi í hesum høpi.
- spælir/syngur tónleik í ymiskum høpi.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Á byrjanardeild verður so smátt farið í holtur við at læra at brúka stuðulin, meðan mann syngur, t.v.s. búk- og ryggjavøddar. Eisini verður arbeitt við at slappa av í andlitsvøddunum, týðiligari úttalu, opna munnin væl og at fáa meira styrki á røddina. Næmingurin skuldi gjarna verið mentur so nógv, at hann/hon kennir røddina betri og torir betri at brúka hana. Og her verður farið í holtur við at syngja sangir í fleiri ymiskum sjangrum. Við hjálp frá lærаranum ber til at venja næmingin við at syngja eina 1. rødd, meðan lærarin tildømis syngur eina 2. rødd. Um til ber, fær næmingurin bjóðað felags undirvísing við øðrum sangnæmingum, so at hesi í felag kunnu læra seg at syngja fleirraddað. Eftir ætlan verður skipað fyri nøkrum konsertum um árið, har næmingarnir kunnu framføra fyri familju og vinum. Viðmælt verður, at næmingurin eisini syngur við í kóri.

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- fær næmingin at venja seg við ljóðførið og tað, ið ljóðførið megnar.
- leggja dent á arbeiðshátt og dugnaskap.
- leggja lunnar undir grundførleika og tónlistaligar grundtættir.
- vekjur ans og mennir hjáveru.
- er opin fyri breiðum og fjøltáttaðum samstarvi
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika

# BYRJANARDEILD - MENNINGARSTIG 1

## VERKLISTI

*Colours of The Wind - Alan Menken/Stephen Schwartz*

*Everything I Do - Bryan Adams*

*Ró - Martin Joensen*

*Á ferð til dreymaland - Anker Eli Petersen/Terji Rasmussen*

*Syngja sama lag - Ólavur Jacobsen*

*Heal The World - Michael Jackson*

*Part Of Your World - Howard Ashman/Alan Menken*

*The Rose - Amanda McBroom*

*I Can See Clearly Now - Johnny Nash*

*Beinta - Christian Wahl/Oskar Hermansson*

*Á kundi á tíðarhavi - Poul F. Joensen/Hanus G. Johansen*

*All Of Me - John Legend*

*Can't Help Falling In Love - H. Peretti/L. Creatore/G. D. Weiss*

*Mítt land - Eyðun Nolsøe*

*Heimið - Kim Hansen/Steintór Rasmussen*

*Imagine - John Lennon*

*Tíðin rennur sum streymur í ár - J. Waagstein/ F. Petersen*

*Wrecking Ball - Mozella/S. Moccio/S. Skarbek*

*Tale As Old As Time - Howard Ashman/Alan Menken*

*Kavin kom - Martin Joensen*

*How Far I'll Go - Lin-Manuel Miranda*

*Have You Ever Seen The Rain - John Fogerty*

*Dreymahav - Gunnar Hoydal/Annika Hoydal*

*Love Someone - Lukas Graham*

*Nú dagurin at enda er - Rudolf Bay/Dione Isaksen*

Harafturat ein rúgva av øðrum sangum og sjangrum alt eftir, hvat ið hóskar seg best til hvønn einstaka næming.

## VENJINGAR

Sangvenjingar verða tilrættislagdar eftir førleikanum hjá tí einstaka.

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

Tónastigar verða tilrættislagdir eftir førleikanum hjá tí einstaka.

# MIÐDEILD - MENNINGARSTIG 2

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur grundleggjandi førleikar á ljóðføri sínum.
- næmingurin endurgevur ymisk sløg av tónleiki.
- skapar sjálvur út frá ymiskum tónastigum og tónasamljóðum
- lurtar eftir egnum spæli og spælinum hjá øðrum.
- skilir og dugur at brúka tríklangir og tónastigar.
- spælir einføld stykki eftir oyranum.
- lesur, tulkar og nýtur tónleikaástøði og tónleikasøgu í venjing av verkum.
- skrivar og/ella spælir/syngur egin løg.
- spælir eftir oyranum út frá einum tónastiga.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Á miðdeild hevur næmingurin eftir ætlan fingið tað grundleggjandi upp á pláss. Tó so verður arbeitt víðari við hesum fyri at tryggja, at næmingurin fær sum mest burturúr røddini og dugir at brúka røddina á rættan og sunnan hátt. Arbeitt verður meira tekniskt, tildømis við frálæruháttinum Complete Vocal Technique, har næmingurin lærir um tær fýra raddarfunktiónirnar Neutral, Curbing, Overdrive og Edge. Eisini verður nomið við klassiskan sang. Sangirnir, ið verða sungnir, eru tekniskt meira krevjandi, og tí verður eisini arbeitt nakað við dynamikki. Næmingurin venur fjølbroyttar sangir við tí fyri eyga at kunna royna ymiskar teknikkir og fáa kunnleika til ymiskar sjangrur. Miðjað verður ímóti, at næmingurin kann framføra sum solistur við rútmubólki ella líknandi og at framføra javnan.

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- byggir víðari á teir førleikar, sum næmingurin longu hevur ognað sær.
- leggur stóran dent á spæligleði og førleika.
- leggur til rættis soleiðis at næmingurin fær roynt seg í ymiskum samanspæli.
- leggur lunnar undir góðan tekniskan førleika og kropsliga tilvitan.
- mennir tónhoyrn og tónalæru í venjing og framførslu.
- leggur dent á tað, ið næmingurin skapar og spælir eftir oyranum.
- mennir grundleggjandi vitan um tónleik.

# MIÐDEILD - MENNINGARSTIG 2

## VERKLISTI

*Nú skínir sólin bjarta - C.E.F. Weyse/Símun av Skarði*

*Fly Me To The Moon - Bart Howard*

*Dream A little Dream Of Me*

*In A Sentimental Mood - Duke Ellington*

*When You Believe - Stephen Schwartz*

*Langt burt frá øðrum londum - Svenskt fólkalag/Gulak Jacobsen*

*Crazy - Willie Nelson*

*Dancing On My Own - Robyn*

*Dreymahav - Gunnar Hoydal/Annika Hoydal*

*Homesick - Lipa/Chris Martin*

*Hallelujah - Leonard Cohen*

*I Have A Dream - B. Andersson/B. Ulvaeus*

*Handan mjørkan - Anker Eli Petersen/Terji Rasmussen*

*Hopelessly Devoted - John Farrar*

*The Scientist - Coldplay*

*Supermarket Flowers - Ed Sheeran/Johnny McDaid/Benjamin Levin*

*Promise Me - Beverley Craven*

*Um eg kundi kvøðið - Stanley Samuelsen*

*Wicked Game - Chris Isaak*

*Eitt kvøldið so síðla - Harkaliðið*

*Eitt dýpi av dýrarið tíð - Jens Pauli Heinesen/Elin Heinesen*

*Sov tú unga ástin mín - ísl. Fólkalag/Andreas Andreasen*

*Crying In The Rain - Carole King*

*Sign Of The Times - Harry Styles*

*Make You Feel My Love - Bob Dylan*

*Um eg kundi kvøðið - J.H.O. Djurhuus/Stanley Samuelsen*

Harafturat ein rúgva av øðrum sangum og sjangrum alt eftir, hvat ið hóskar seg best til hvønn einstaka næming.

## VENJINGAR

Sangvenjingar verða tilrættislagdar eftir førleikanum hjá tí einstaka.

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

Tónastigar verða tilrættislagdir eftir førleikanum hjá tí einstaka.

# HÁDEILD - MENNINGARSTIG 3

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur framkomnar førleikar á egnum ljóðføri.
- er førur fyri at kaga djúpt, og spæla tónleik á sjálvstøðugan og persónligan hátt.
- spælir nógv ymisk verk.
- hevur góða tónahoyrn.
- nýtir ástøði í tónleikaframførsluni.
- dugir væl at nýta tónlistalig frøðiheiti.
- hevur nógvar royndir á palli.
- hevur spælt í bólkum av ymiskum slag.
- megnar at framføra krevjandi venjingar og tónaverk.
- ger sær dælt av ymiskum upphitingar- og hugsavningararháttum.
- er góð fyrimynd fyri aðrar næmingar.
- fyrireikar seg við lít bæði til upptøkuroyndir og víðari útbúgving.
- hevur tamarhald á og kunnleika til grundleggjandi tøkni á sínum egna ljóðføri.
- venur á ymiskan hátt og hevur stirðil, í dagliga arbeiðinum.
- framførir javnan.
- leggur framførslu til rættis, og velur verkini í samstarvi við læraran.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Á hádeild er næmingurin eftir ætlan so mikið væl fyri tekniskt, at lærarin og næmingurin kunnu brúka faklig og teknisk heiti sínamillum. Dentur verður lagdur á, at næmingurin er førur fyri at syngja meira avbjóðandi/krevjandi verk, har tað eisini verður arbeitt nógv við klangi, tekstatulking, úttrykki og dynamikki. Næmingurin eigur sjálvur at kunna seta orð á, hvat ið riggar ella ikki riggar, og hví tað er so. Á tann hátt fær næmingurin eisini vant betri sjálvur og tillagað venjingina rætt. Arbeitt verður við enn fleiri sangstílum/sjangrum fyri at styrkja um kunnleikan hjá næminginum. Ynskiligt er, at næmingurin framførir javnan. Næmingar, ið megna væl at syngja stemmur kunnu luttaka í kórinum XPERIMENT, sum er eitt rútmiskt 4-6 raddað a cappella kór, ella í klassiska ungdómskórinum Cantus. Á hádeild eru eisini ofta næmingar, ið luttaka í sangleiki á

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- leggja eina menningarætlan, ið er á høgum fakligum og tónlistaligum støði.
- eggja til sjálvstøðugan arbeiðshátt.
- vera førur fyri at síggja menningarmøguleikar, kveikja og geva íblástur.
- birta upp undir tónlistaligt tilvit.
- fáa næmingin at vera tilvitaðan um at seta sær stutt- og langtíðar mál.

- leggja til rættis fjølbroytt samspæl, og geva næminginum drúgvar royndir á palli.
- meta um bæði tilgongd og tilfar saman við næminginum.
- leggja dent á gott samstarv millum heim, musikkskúla, lærara og næming.

# HÁDEILD - MENNINGARSTIG 3

### VERKLISTI

*I Know Him So Well – Tim Rice/B. Andersson/B. Ulvaeus*

*Come What May - David Baerwald/Kevin Gilbert*

*Memory – Andrew Lloyd Webber*

*Soria Moria – Svein Gundersen/Tor Andersen*

*I Will Always Love You – Dolly Parton*

*Nothing Compares To You – Prince*

*Never Enough – Benj Pasek and Justin Paul*

*Chandelier - Sia*

*Hero – Mariah Carey/Walter Afanasieff*

*It's All Coming Back To Me Now – Jim Steinman*

*Grenseløs - Sebastian*

*Run To You – Jud Friedman/Allan Rich*

*Bohemian Rhapsody – Queen*

*Shallow – Lady Gaga/A. Wyatt/A. Rossomando/M. Ronson*

*Always Remember Us This Way – Lady Gaga/N. Hemby/H. Lindsay/L. McKenna*

*Black Velvet – Christopher Ward/David Tyson*

*Climb Every Mountain – Rodgers and Hammerstein*

*Inte jag – B. Andersson/B. Ulvaeus*

*Hello – Adele/Greg Kurstin*

*Lascia ch'io pianga – Händel*

*My Funny Valentine – Rodgers & Hart*

*Overgir mig langsomt – Mads Langer*

*Sebben crudele – A. Caldara*

*Per la gloria – G.B. Bononcini*

*Somewhere – Stephen Sondheim*

*I Don't Know How To Love Him – Andrew Lloyd Webber*

Harafturat ein rúgva av øðrum sangum og sjangrum alt eftir, hvat ið hóskar seg best til hvønn einstaka næming.

### VENJINGAR

Sangvenjingar verða tilrættislagdar eftir førleikanum hjá tí einstaka.

### TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

Tónastigar verða tilrættislagdir eftir førleikanum hjá tí einstaka.

# FRAMKOMIN DEILD - MENNINGARSTIG 4

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur framkomnar førleikar á egnum ljóðføri.
- er førur fyri at kaga djúpt, og spæla tónleik á sjálvstøðugan og persónligan hátt.
- spælir nógv ymisk verk.
- hevur góða tónahoyrn.
- nýtir ástøði í tónleikaframførsluni.
- dugir væl at nýta tónlistalig frøðiheiti.
- hevur nógvar royndir á palli.
- hevur spælt í bólkum av ymiskum slag.
- megnar at framføra krevjandi venjingar og tónaverk.
- ger sæl dælt av ymiskum upphitingar- og hugsavningararháttum.
- er góð fyrimynd fyri aðrar næmingar.
- fyrireikar seg við lít bæði til upptøkuroyndir og víðari útbúgving.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Á framkomnu deild eigur næmingurin at vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt (við vegleiðing frá læraranum). Tað verður serliga arbeitt nógv við ymiskum sangstílum/sjangrum, soleiðis at næmingurin kann menna sín egna stíl. Ofta er talan um næmingar, ið ganga á musikkmiðnámi ella PO, men eisini aðrar ídnar og evnaríkar næmingar, ið hava fingið undirvísing í nógv ár. Eitt tað týdningarmesta er, at næmingurin er førur fyri at framføra sjálvstøðugt og er ein aktivur partur av tónleikaumhvørvinum bæði á skúlanum og uttanfyri skúlan. Næmingurin verður eggjaður til at spæla við øðrum tónleikarum og framføra nógv. Tað er ikki óvanligt, at lærarin hjálpir næminginum at arbeiða fram ímóti upptøkuroynd til hægri lesna innan tónleik.

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- leggja eina menningarætlan, ið er á høgum fakligum og tónlistaligum støði.
- eggja til sjálvstøðugan arbeiðshátt.
- vera førur fyri at síggja menningarmøguleikar, kveikja og geva íblástur.
- birta upp undir tónlistaligt tilvit.
- fáa næmingin at vera tilvitaðan um at seta sær stutt- og langtíðar mál.
- leggja til rættis fjølbroytt samspæl, og geva næminginum drúgvar royndir á palli.
- meta um bæði tilgongd og tilfar saman við næminginum.
- leggja dent á gott samstarv millum heim, musikkskúla, lærara og næming.

# FRAMKOMIN DEILD - MENNINGARSTIG 4

### VERKLISTI

*Don't Stop Believing - Steve Perry/Jonathan Cain/Neal Schon*

*My All - Mariah Carey/Walter Afanasieff*

*Learned From The Best - Diane Warren*

*The Show Must Go On - Queen*

*Jesus To A Child - George Michael*

*Somewhere Over The Rainbow - Harold Arlen/Yip Harburg*

*Power of Love - G. Mende/C. DeRouge/J. Rush/M. S. Applegate*

*I Wish - Stevie Wonder*

*The First Time Ever I Saw Your Face - Ewan MacColl*

*Wishing You Were Somehow Here Again - Andrew Lloyd Webber*

*One Moment In Time - Albert Hammond/John Bettis*

*Overgir mig langsomt - Mads Langer*

*My Funny Valentine - Richard Rodgers/Lorenz Hart*

*All I Ask - Adele/Bruno Mars/P. Lawrence/C. B. Brown*

*Halo - Ryan Tedder/Evan Bogart/Beyonce*

*I Will Always Love You - Dolly Parton*

*Unintended - Muse*

*Nature Boy - Nat King Cole*

*Wishing You Were Somehow Here Again - Andrew Lloyd Webber*

*Open Arms - Steve Perry/Jonathan Cain*

*I Have Nothing - David Foster/Linda Thompson*

*Stormy Weather - Harold Arlen/Ted Koehler*

*Heiðarósan - von Goethe/Fr. Schubert*

*Lascia ch'io pianga - George Friedrich Händel*

*Casta Diva - Vincenzo Bellini/Felice Romani*

*Amarilli, mia bella - Giulio Caccini*

*O mio babbino caro - Giacomo Puccini/Giovacchino Forzano*

*En Aranjuez con tu amor - Joaquín Rodrigo/Alfredo García Segura*

Harafturat ein rúgva av øðrum sangum og sjangrum alt eftir, hvat ið hóskar seg best til hvønn einstaka næming.

### VENJINGAR

Sangvenjingar verða tilrættislagdar eftir førleikanum hjá tí einstaka.

### TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

Tónastigar verða tilrættislagdir eftir førleikanum hjá tí einstaka.